# <u>Viðtøkur fyri eldraráðið í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu - Nánd.</u>

## Inngangur:

Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ásett í § 6, stk. 2, at *"kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast".*

Vísandi til hesa lógarheimild eru Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna samdar um at skipa eitt felags eldraráð.

## § 1 – Endamál.

Eldraráðið er ráðgevi hjá kommununum/Nánd – og fær í lag samskifti millum eldru borgararnar og kommunurnar/Nánd.

<u>Stk. 2.</u>
Eldraráðið verður kunna um tiltøk, sum hava týdning fyri tey eldru, og eigur at samstarva við kommunurnar/Nánd fyri at tryggja, at atlit verður tikið til ynski og tørv hjá teimum eldru.

<u>Stk. 3.</u>
Eldraráðið skal koma við hugskotum og virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum eldru verða virðismett og gagnnýtt.

## § 2 – Heimild.

Eldraráðið veitir kommununum/Nánd ráð í eldrapolitiskum spurningum og virkar sum ein samskiftisstovnur millum borgarar og kommunurnar/Nánd í samband við tilrættalegging av eldrapolitikkinum.

<u>Stk. 2</u>
Kommunurnar/Nánd eiga at spyrja eldraráðið um viðurskiftir, sum viðvíkja teimum eldru.

<u>Stk. 3</u>
Kommunurnar/Nánd samskifta við eldraráðið í málum, sum hava við teirra málsøki at gera.

<u>Stk. 4</u>

Eldraráðið kann av sínum eintingum siga kommununum/Nánd sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru, koma við hugskotum og uppskotum og seta spurningar.

## § 3 – Starvsháttur eldraráðsins.

Eldraráðið skal kunna seg um ynski og tørv teirra eldru og um viðurskifti á eldraøkinum.

Stk. 2.

Eldraráðið skal virka fyri áhaldandi kunning til tey eldru um broytingar og nýskipan á eldraøkinum.

Stk. 3.

Eldraráðið skal halda fast um og útbyggja samskiftið við kommunurnar/Nánd gjøgnum framhaldandi meting av tiltøkum á eldraøkinum og harvið menna og tillaga tey samsvarandi samfelagsmenningina.

## § 4 - Eldraráðsins samanseting.

Íbúgvararnir í hvørjari kommunu velja síni umboð í eldraráðið, har hvør kommuna fær 3 umboð.

Stk. 2.

Tey næstvaldu á viðkomandi vallistum verða varalimir eftir galdandi valreglum.

Stk. 3.

Valskeiðið er 4 ár.

Stk. 4.

Umboð í ráðnum kann frítakast fyri limaskap eftir áheitan. Eldraráðið tekur avgerð um, hvørt umboð verður frítikið.

Stk. 5.

Um ein limur í valskeiðnum missir valbæri, doyr ella verður frítikin sambært § 4 stk. 4, kemur varalimur inn í tí raðfylgju, teir eru valdir.

Stk. 6.

Er eingin varalimur á listanum at seta ístaðin, verður spurningur um eykaval tikin upp við viðkomandi kommunu.

## § 5 - Val til eldraráðið.

Val til eldraráðið er 4. hvørt ár í samband við kommunustýrisvalið.

Stk. 2.

Valbæri hava borgarar í viðkomandi kommunu, sum valdagin hava fylt 60 ár.
Atkvøðurætt hava borgarar í viðkomandi kommunu, sum valdagin hava fylt 60 ár.

Stk. 3.
Valevni, sum ynskja at stilla upp, geva skrivlig boð til avvarandi kommunu í seinasta lagið 4 vikur áðrenn valið verður hildið.

Oyðubløð til uppstilling av valevnum eru at fáa á www.eysturkommuna.fo og www.fuglafjordur.fo ella við at venda sær til skrivstovuna hjá kommununum.

Stk. 4.
Bara valevni, sum rættstundis hava boðað frá, kunnu vera uppstillað.

Stk. 5.
Reglurnar um val til eldraráð – herundir freistir, vallistar, atkvøðugreiðsla, brævatkvøður., kunngerð og uppgerð av valinum, klagur um valið v.m. – vera annars at fylgja teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum og mannagongdum fyri val av kommunustýri.

## § 6 – Stovnan og arbeiðsháttur.

Eldraráðið skipar seg við formanni og skrivara á fyrsta fundi eftir valið.

Stk. 2.
Eldraráðið ásetur sjálvt fundarskrá sína, hvussu ofta fundir skulu vera, reglur fyri dagskrá, fundarinnkalling og ráðsins arbeiðshátt.

Stk. 3.
Dagsskrá og fundarfrásøgn skulu sendast til leiðsluna í Nánd, sum tryggar at viðkomandi mál verða send til viðgerðar á rætta stað.

Stk. 4.
Limirnir í eldraráðnum fáa eina samsýning svarandi til gjald fyri fund undir tríggjar tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur av ferðing til og frá fundum í eldraráðnum.

Stk. 5.
Kommunurnar seta pening av á fíggjarætlanina hjá Nánd, sum umsitur tann fíggjarliga partin av virkseminum hjá eldraráðnum.

Stk. 6.
Kommunurnar veita eldraráðnum fundarhøli til nevndarfundirnar.

## § 7 – Gildiskoma og íverksetan.

Viðtøkurnar koma í gildi, tá tær eru samtyktar av stýrinum fyri Nánd/kommununum.

## § 8 – Broytingar í viðtøkunum.

Eldraráðið ella ein meiriluti, kann koma við uppskoti til stýrið fyri Nánd um broytingar í viðtøkunum.

<u>Stk. 2.</u>
Kommunurnar og Nánd kunnu koma við uppskoti til broytingar í viðtøkunum.

<u>Stk. 3.</u>
Broytingar í viðtøkunum koma í gildið, tá tær eru samtyktar av kommunustýrunum.

## § 9 – Um at taka Eldraráðið av.

Kommunurnar kunnu til eina og hvørja tíð gera av, at Eldraráðið verður tikið av.
Men áðrenn ein slík avgerð verður tikin, skal málið í góðari tíð frammanundan verða lagt fyri eldraráðið og Nánd til ummælis.

<u>Stk. 2.</u>
Verður eldraráðið tikið av, fella allar møguligar ognir v.m. til kommunurnar.

**Soleiðis samtykt av Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu.**

Dagfesting: 27.09.2022

Per Martin Gregersen

Borgarstjóri í Eysturkommunu

**Eysturkommuna**
Oyran 2
FO-512 Norðagøta
Tlf. 730000 – eystur@eystur.fo

Dávur Juul, borgarstjóri

**Dávur Juul**
*Borgarstjóri*
Í Støð 5
530 Fuglafjørður

Borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu